

www.oljan.fo

**Jan Müller** 11 - 10 - 2012

# Lundin aftur á breddanum

Lundin Petroleum hevur rakt við olju í Albert-brunninum, sum er einar 35 fjórðingar í útnyrðing úr Snorre-leiðini. Felagið er í ferð við at kanna kjarnuroyndir úr brunninum, men sambært Aftenbladet er ikki talan um nakra stóra keldu. Tað var boripallurin Bredford Dolphin, sum boraði fyri Lundin. Dýpið har er 382 metrar, og pallurin boraði 2.975 metrar niður í undirgundina. -Tað er jaligt, at vit hava funnið eitt sindur av olju í Albert-boringini, og kunnu vit finna meiri í nakað ovari, eru møguleikar fyri lønandi rakstri í økinum, sigur Ashley Heppenstall, forstjóri í Lundin Petroleum, í einum tíðindaskrivi. Lundin Petroleum er operatørur og eigur 40 prosent av loyvinum. Samstarvsfeløgini Bayerngas Norge AS, Norwegian Energy Company ASA og Spring Energy eiga hvør síni 20 prosent. Lundin er eisini partur av risastóru Sverdrup kelduni. Vert er eisini at merkja sær, at tveir føroyingar eru í oddastørvum í Lundin. Teitur Poulsen úr Havn er vorðin íløgustjóri í felagnum og hevur sæti í Geneve, meðan Tummas Pauli á Mýri úr Klaksvík arbeiðir á skrivstovuni i Oslo við vinnuutbyggingum.